## Kamal í Grikkalandi

Gambiski álopsspælarin Mustafa Kamal N'Dew hevur tvær ferðir roynt seg í føroyskum fótbólti, men báðu ferðirnar er hann rýmdur av landinum aftur eftir fáar dystir. Kamal hevur spælt fyri B71 og B68. Nú spælir Kamal í grikskum fótbólti, veit heimasíðan hjá B68 at siga. Kamal spælir fyri botnliðið Veria FC, og í fyrsta dysti sínum skoraði Kamal málið, sum tryggjaði liðnum ein sigur á Larisa. Síðani hevur Kamal spælt fýra dystir, liðið hevur tapt allar og hevur einki mál skorað.



## Atli og teir taptu

Danska 1. Deildarliðið Frem spældi um vikuskiftið venjingardyst ímóti Herfølge, og hóast tað gekk rímiliga væl hjá Frem í hesum dystinum, so taptu teir 3-1. Í hálvleikinum var støðan 1-1, men í seinna hálvleiki skoraði Herfølge tvey mál. Atli Danielsen spældi á miðvøllinum hjá Frem frá byrjan, men eftir ein tíma var hann skiftur út.



# Alt virkaði til fulnar

**Við vitanini um, at tað var triðja steypafinalan hjá ÍF kvinnunum, og at tær onga høvdu vunnið frammanundan, segði Katrin Olsen, at tær høvdu ætlanir um at leggja optimalt press á servurnar. Hetta gekk til fulnar heldur Katrin Olsen**

**FLOGBÓLTUR**
*Niels Petersen*

Katrin Olsen var ikki ósamd í, at ÍF var betra liðið á finaludegnum leygardagin, og at tær sótu á dystinum frá byrjan til enda.

- Eftir eina nervakenda byrjan, fingu vit tamarhald á mótstøðuliðnum, og haðani var tað ein góður dystur hjá okkum, meðan tað hinvegin var ein minni góður dystur hjá ungu SÍ kvinnunum.

Nú var tað tú, sum hevði avgerandi síðsta slagið í dystinum, hvussu følist tað?

- Tað føldist ótrúliga gott, tí eg eri jú hevari, og vanliga eri eg tann, ið leggi bóltin fyri hinar at smekka til, so eg helt, at skuldi eg avgera ein orduligan bólt, so skuldi tað vera nú. (støðan tá, var 24-21 blaðm.) Eg var heppin, og mítt slag snýtti mótstøðuliðið, og bólturin fór í gólvið, og vit eru steypavinnarar.

At tað samstundis er tykkara fyrsti finalusigur, man ivaleyst ikki hava gjørt upplivilsið verri?

- Ja, tað var heilt fantastiska deiligt.

Helen á Lakjuni helt eisini at servupressið var avgerandi fyri útfallið av dystinum.

- Góðar servur løgdu alt fyri eitt press á ungu SÍ genturnar, og tað haldi eg, at man sá á hevaranum hjá teimum. Hon rann runt á vøllinum og royndi at heva, men tað var torført hjá henni at fáa nakað burturúr, ið kundi nýtast til skilagott álop. Teir bóltarnar, ið so komu yvirum netið vóru vit til reiðar at knalla niður í høvdið á teimum aftur, siga Katrin Olsen og Helen á Lakjuni hjá ÍF, ið hevði kontrol yvir støðuni allan dystin á tamb.

- Alt virkaði hjá okkum. Tað var bert eitt sindur turbulent í fyrstani, men tá vit blivu heitar, tá var bara ein vegur og ein vinnari, sigur Katrin at enda.



*Katrin Olsen sæst her halda steypinum yvir høvur, og hon var eisini tann, ið vann seinasta avgerandi stigið til ÍF. Ein heldur ókend støða hjá hevaranum, ið er »still going strong«*

# Vit góvu ÍF sigurin

**Karin Mikkelsen helt, at SÍ als ikki raktu dagin, og hon er sera hørm um at fjeppurar felagsins skuldu síggja ein so lakan innsats. Vit gjørdu alt ov nógvir feilir, og teir vórðu revsaðir, og tá gerst brekkan tung at ganga**

**FLOGBÓLTUR**
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Onkra ferð skal ein finala tapast, og tann veruleikan máttu sørvágskvinnur ásanna leygardagin, og Karin Mikkelsen viðgekk, at kenslan var alt anað enn góð.

- Hetta var ræðuligt. Spælið kom ikki í gongd hjá okkum.

Hvat gekk galið hjá tykkum í dag?

- Vit gera alt ov nógvar feilir, og spæla við nervunum fullkomuliga uttaná í dag. Vit heilt einfalt geva ÍF sigurin í dag. Hetta var ræðuligt.

ÍF raka langt frá teirra besta í dag, og hóast tað sannroynd, megna vit ikki at standa teimum kurl. Tað er ikki gott nokk.

Hvat gjørdu ÍF rætt, sum tit ikki gjørdu?

- ÍF kvinnurnar vóru róligar, og høvdu greiðan yvirvág, orsakað av okkara villum. Vit koma ongantíð inn í dystin aftur, hóast vit mangan hava megnað hetta áður.

Nú liggja tit enn rættuliga væl fyri í landskappingini. Ætla tit tykkum eftir meistaraheitinum nú?

- Eg eri rættuliga hørm um at vit leveraðu ein sovorðnan innsats í dag, og tori at lova, at sovorðið hendir ikki aftur. Hetta hava vit ikki uppiborið, og ei heldur okkara trúgvu fjepparar, ið royndu at stuðla, sum tey eru von. Vit hava bestu fjepparanar í landinum, sigur Karin Mikkelsen at enda.



*Karin Mikkelsen er sera hørm um vána avrikið í finaluni, og hon sigur, at tær fara at gera alt í teirru makt, til at vinna FM-heitið*






Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

Skjern Bank bjóðar íløgumøguleikar, ið hóska júst til tín tørv.

Fá eitt prát við Gunnar Streymoy og hoyr nærri um tínar møguleikar.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK